UTTAN ÚR HEIMI



*Ismail Haniyeh verður helst nýggjur palestinskur forsætisráðharri, men ísraelski herurin roknar hann sum umboð fyri ein yvirgangsfelagsskap*

# Ísrael ætlar at byrgja palestinar inni

**Tá tað nývalda palestinska tingið verður tikið í eið leygardagin, verður Palestina fíggindaland, sigur ísraelska stjórnin. Ísraelski herurin mælir til at avbyrgja økið frá umheiminum**

ÍSRAEL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Ísraelska stjórnin hevur gjørt greitt, at hon fer ikki at tosa við eina Hamas-stjórn, fyrr enn flokkurin hevur uppfylt tríggjar treytir. Í fyrsta lagi skal Hamas viðurkenna Ísrael, í øðrum lagi skal felagsskapurin gevast við øllum vápnaðum ágangi, og í triðja lagi skal Hamas laga seg eftir teimum semjum, sum Ísrael og tann fráfarandi palestinska stjórnin hava gjørt.

Hamas hevur boðið sær til at lýsa vápnahvíld og at tingast við ísraelsku stjórnina, um so er, at Ísrael tekur seg aftur til markið undan krígnum í 1967. Tað merkir, at Ísrael skal lata palestinum Gaza-geiran og Vestara Áarbakka.

Ísraelsk bløð skriva, at stjórnin hjá Ehud Olmert, forsætisráðharra hevur longu lagt ætlanir um, hvat gerast skal, tá Hamas tekur við valdinum. Millum annað skal stjórnin hava samtykt at halda aftur pengunum, sum ísraelska toll- og skattavaldið krevur inn fyri palestinsku myndugleikarnar. Talan er um einar 350 milliónir krónur um mánaðin.

### Harðligt til verka

Men sambært bløðunum hevur ísraelski herurin hug at fara nógv harðligari til verka. Blaðið Yediot Ahronot skrivaði í gjár frá loyniligum keldum í verjumálaráðnum, at fær herurin sín vilja, verða teir palestinsku politikararnir í framtíðini roknaðir sum umboð fyri ein yvirgangsfelagsskap og fáa viðferð sum slíkir.

Eitt annað blað, Maariv, skrivaði um vikuskiftið, at herleiðslan hevur mælt stjórnini til at sleppa øllum hugsanum um samband við palestinar. Tvørturímóti skulu teir byrgjast inni. Tað skal millum annað hava við sær, at allir vegir ímillum Ísrael og tey palestinsku økini verða stongdir, og at eingir palestinar sleppa til arbeiðis í Ísrael. Fremmand ferðafólk sleppa heldur ikki um markið.

– Vit skulu framhaldandi selja teimum elmegi og mjólk til pinkubørn, um tað vísir seg at vera neyðugt. Men tað er eisini alt, skrivar Maariv frá vælvitandi keldum í verjuleiðsluni. Blaðið leggur afturat, at rndamálið við ætlanini hjá herleiðsluni er at taka beinini undan palestinsku myndugleikunum og forða fyri, at teir fáa altjóða viðurkenning ella stuðul.

# Slaktarin úr Genova deyður

**Fyrrverandi SS-yvirmaðurin Friedrich Engel doyði í síðstu viku.**

DEYÐSFALL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Friedrich Engel var ovasti fyri einari SS-deild, sum avrættaði 59 fólk við Turchino-skarðið nærhendis italska býnum Genova tann 19. mai í 1944. Avrættingarnar vóru hevnd fyri, at italskir mótstøðumenn høvdu søkt at einari biohøll, har fimm týskir hermenn doyðu.

Í 2002 varð Friedrich Engel ella „Slaktarin úr Genova", sum hann bleiv róptur, dømdur sjey ára fongsul fyri drápini í Italia. Dómstólurin í Hamburg kom til ta niðurstøðu, at tað var Enegl, sum hevði ábyrgdina av drápunum, tí hann var ovasti fyri SS-deildini í Genova um tað mundið. Í 2004 bleiv dómurin kortini ógildaður, tí týski samveldisdómstólurin helt ikki, at prógvini vóru nóg góð.

Friedrich Engel var 97 ára gamal, nú hann doyði.

## Gongur nú á fimta ári

Mánadagin vóru fýra ár, síðani rættarmálið ímóti fyrrverandi jugoslaviska forsetanum Slobodan Milosevic byrjaði.

Eftir ætlanini skal rættarurin enda viðgerðina í apríl, og dómur fellur so væntandi eina ferð seinni í ár. Tað er kortini longu nú greitt, at tað verður ikki endin á málinum, tí sama hvat úrslitið verður, fer annar parturin at kæra úrskurðin.

Ákæruvaldið hevur 294 vitni, sum skulu sannføra krígsbrotsmannadómstólin um, at Miloseciv ætlaði at skipa Serbia sum eitt land, har bara serbar skuldu búgva, og at øll onnur skuldu beinast av vegnum ella rekast burtur. Milosevic hevur boðsent 48 vitnum, sum skulu vísa hesum aftur, og at NATO framdi krígsbrotsverk og breyt altjóða lóg, tá samgongan leyp á landið.

## Abbas størri vald



*Mahmoud Abbas*

Júst sum Hamas tekur við stjórnarleiðsluni í teimum palestinsku økjunum, hevur palestinska tjóðartingið samtykt at geva Mahmoud Abbas, forseta størri heimildir.

Eitt nú hevur forsetin fingið heimild til at skipa ein grundlógardómstól, sum skal taka støðu til møguligar ósemjur ímillum forsetan og Hamas í framtíðini. Harafturat setti tingið nøkur týðandi størv í umsitingini, og yvirhøvur er talan um menn, sum eru limir í Fatah-flokkinum, skrivar AP. Millum annað fekk stovnurin, sum heldur eygað við korrupsjón og sviki, nýggjan leiðara.

Hamas hevur longu boðað frá, at flokkurin góðkennir ikki samtyktirnar hjá tinginum, og at flokkurin fer at seta tær úr gildi, so skjótt tað nývalda tingið hevur tikið við. Men tað kann gerast trupult, tí sambært stýrisskipanini kunnu samtyktirnar ikki setast úr gildi, uttan so at tveir triðingar at tinginum atkvøða fyri. Tað merkir, at minst 82 av teimum 130 tinglimunum skulu taka undir við Hamas, og sum er hevur flokkurin 74 sæti í tinginum. Tað er tó ikki óhugsandi, at onkrir óheftir tinglimir fara at stuðla Hamas í hesum málinum, skrivar AP úr Ramallah.

## „Jaws"-maðurin deyður

Amerikanski rithøvundurin og fyrrverandi blaðmaðurin Peter Benchley er deyður 65 ára gamal eftir drúgva sjúkralegu.

Peter Benchley var kanska ikki so kendur av navni sum mangir aðrir rithøvundar, men tað var hann, sum skrivaði bókina „Jaws", sum var grundarlagið undir tí væl kenda filminum við sama navni ella „Dødens Gab", sum hann bleiv kallaður á okkara leiðum. Hann skrivaði eisini bøkurnar „The Deep" og „The Island", sum báðar eru gjørdar til film.

Peter Benchley hevur seinni greitt frá, at hann fekk hugskotið til bókina „Jaws", tá hann ein dagin frætti um ein fiskimann, sum hevði fingið ein stóran háv uttan fyri Long Island. Í 1975 gjørdi kendi filmsmaðurin Steven Spielberg bókina til film, sum vann tríggjar Oscar-virðislønir.

## Óreiðiligir flokslimir

Í fjør vórðu umleið 115.000 fólk koytd úr kommunistaflokkinum í Kina, tí tey høvdu svikað ella framt annað lógarbrot. Tað svarar til tvey prosent av limatalinum, skrivar almenna tíðindastovan Xinhua.

Í 2004 mistu 24.000 fólk limaskapin í flokkinum, og 15.000 teirra vórðu meldað til løgregluna. Xinhua sigur ikki, hvussu nógvir flokslimir vórðu meldaðir til løgregluna í fjør.